# Ein marknaður sum vil gjalda

**Við samstarvinum verður miðað eftir meiri støðugum arbeiði á virkinum. Og talið av arbeiðsfólkum fer helst eisini at økjast**

SILD
*Snorri Brend*

**Kollafjørður:** Fyri Kollafjord Pelagic fer hetta samstarvið at geva ein nógv størri marknað, tí danska fyritøkan frammanundan hevur drúgvar royndir í at selja júst sild í Europa.

- Á henda hátt kunnu vit eisini fáa fatur á tí marknaðinum, ið er sinnaður at lata meiri fyri okkara vørur, varð sagt.

Á virkinum í Kollafirði eru eisini gjørdar ymiskar broytingar í framleiðsluni, har m.a. maskinur fyri einar 10 mió. kr. eru settar upp, soleiðis at framleiðslan kann gerast so lønandi sum tilber.

Hóast hesa heldur kostnaðarmiklu íløguna, so hevur virkið ikki brúk fyri eyka kapitali beint nú.

## Aðrar framleiðslur

Við hesum maskinunum ber til at arbeiða sild undan í ymiskum støddum og av ymiskum slagi. Hetta ger so aftur sítt til, at møguleikarnir fyri meiri støðugum arbeiði á virkinum eru til staðar.

At byrja við verður tað so bert sild, sum skal arbeiðast undan á virkinum.

Men stjórin, Dánjal Jákup Andreasen sigur, at onnur fiskasløg eisini kunnu koma uppá tal — eitt nú svartkjaftur.

Ynskið hjá virkinum er allatíðina at hava so støðugt arbeiði sum gjørligt — t.v.s. longri enn sjálva sildatíðina, sum vanliga er frá mai mánaði og út á heystið.

Hetta sama fer uttan iva eisini at gera seg galdandi við talunum av starvsfólkum. Vanliga hava hesi ligið um eini 35 í tali.

Men tá tað veruliga úrslitið av samstarvinum fer at vísa seg, og rávørunøgdirnar fara úr 15.000 tonsum upp í tað dupulta, er ikki óhugsandi at eini 50 fólk fara at arbeiða á virkinum.



*Kollafjord Pelagic hevur havt eina turbulenta tíð, men nú er grundarlag lagt fyri eini tryggari framtíð, bæðI hvart rávørutilgongd og sølu viðvíkur*



*Møguleikar verða nú skaptir fyri at arbeiða bæði sild og markel, og selja hesar framleiðslurnar til Eystureuropa og meginøkið í Europa*

*(savnsmynd)*

## Um Erik Taabel Fiskeeksport

**1948:** Erik Taabbel byrjar virksemið sítt í einum reyðum træpakkhúsi á havnini í Skagen med filetering, pakking og sølu av fiski fyri eyga.
**1955:** Útflutningur til Týsklands byrjar, og Erik Taabbel økir virksemið í størri hølum.
**1960:** Erik Taabel byggir sína egnu vermskiðju (ídag: Verksmiðja 1). Hann installerer eisini tríggjar nútíðar flakamaskinur við stórum kapasiteti. Núverandi stjórin og eigarin, Viggo Gjødesen Mikkelsen (vanliga nevndur Mikkelsen) byrjar í fyritøkuni.
**1967:** Framleiðslan av kryddsild byrjar, og seinni eisini av saltsild til heimamarknaðin.
**1971:** V. G. Mikkelsen verður medeigari. Útflutningurin av matjessild byrjar til Holland. Við nýggjum maskinum verður økt um framleiðsluna og góðskuna.
**1973:** Erik Taabbel Fiskeeksport luttekur í menningini av einum nýggjum slagi av flakamaskinum. Við sentrifugum verður fiskaolja útvunnin úr spillvatninum. Økt tal av starvsfólkum gera tað neyðugt við fleiri útbyggingum.
**1981:** Stovnarin Erik Taabbel doyr. Sama ár verður framleiðslan víðkað við foredlaðum sildavørum í nýggjari verksmiðju á Coasterbryggjuni (verksmiðja 2).
**1983:** V. G. Mikkelsen verður eigari av fyritøkuni.
**1986-90:** Framleiðslan av foredlaðum sildavørum verður víðkað enn meiri.
**1990:** Verksmiðja 3 við frystihúsi verður bygd. Í **1992** verður farið undir samstarv við DTI og Aalborg Universitet um góðsku og umhvørvisstýring. Nýggjar heilautomatiskar maskinur til matjessild eru klárar í **1995**.
**1995:** Sum tann fyrsta fyritøkan í heiminum fær Erik Taabbel Fiskeeksport eina integreraða kvalitets- og miljøcertificering - ISO 9002 og ISO 14001. Í **1997** verður góðskutrygdin víðkað við HACCP.
**1992-98:** Fyritøkan fær Skagens Erhvervspris í **1993**. Fær Umhvørvisprísin hjá ES í **1998**.
2000: Projektering af 4.000 fermetra stórum kølirúmsbyggjarii byrjar. Farið verður undir eitt ættarliðsskifti.
**2003:** Tað 4.000 fermetra stóra kølirúmið verður tikið í nýtslu. Norsk Veritas verifiserer fyritøkuni eina arbeiðsumhvørvis-leiðsluskipan OHSAS 18001. Nýtt laboratorium verður tikið í nýtslu.
**2004:** Farið verður undir at prosjektera eitt 3.000 fermetrar stórt kølirúm aftrat.
**2005:** Samstarvsavtala við Kollafjord Pelagic verður undirskrivað.



*Teir hava júst undirskrivað avtaluna – stjórin á Kollafjord Pelagic, Dánjal Jaákup Andreasen, nevndarformaðurin Sverri Hansen og Viggo Gjødesen Mikkelsen, stjóri í Taabbel Fiskeeksport. Hesin seinast nevndi byrjaði í fyritøkuni í 1960, gjørdist eigari av fyritøkuni í 1983 og er enn virkin her*